

## Skotland hevur kós móti endaspælinum

Hóast Skotland hesa ferð er í bólki saman við fleiri av stinnastu fótbóltstjóðunum í Europa - eitt nú Fraklandi, Italia og Ukreina - so eru skotar saman við fransmonnum á odda í bólki B.

Skotar løgdu bragdliga fyri ímóti Georgia leygardagin, og tá ið 10 minuttir vóru farnir, legði Kris Boyd heimaliðið framum, eftir eitt gott innlegg frá Gary Teale. Eftir hetta setti Georgia seg á spælið, og tað gav úrslit fimm minuttir undan steðginum, tá ið fyrrverandi Glasgow Rangers-leikarin, Shota Arveladze, javnaði. Inntil tað restaðu tveir minuttir stóð á jøvnum. Hampdem Park kókaði rættuliga, tá ið innskifti Craig Beattie skoraði sigursmálið.

## Makaay gevur skarvin yvir

Álopsspælarin Roy Makaay heldur, at hansara felag ikki longur hevur møguleikan at vinna týska meistaraheitið í ár. Bayern Munchen er nýggju stig aftanfyri fremsta liðið, og úrslitið hava verið vánalig seinastu vikurnar.

- Tað skal henda eitt undur, um vit skulu gerast meistarar. Tað er jú bara átta dystir eftir, og vit eru 9 stig aftan fyri Schalke, Roy Makaay.

## Jón Rói ikki við í Georgia

**Jón Rói Jacobsen fekk heilaskjálvta undir venjingini hjá landsliðnum hósdagin, og er tí ikki við í ferðalagnum í Georgia**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Tbilisi, Georgia:** Jón Rói Jacobsen hevur verið skaddur í fleiri mánaðir, men meldaði seg tøkan til landsliðið, undan dystinum móti Ukreina mikudagin.

Hann luttók eisini í fyrstu venjingini, tá landsliðið var í Føroyum, men bara eina løtu, áðrenn hann fór út við nýggjum einum nýggjum skaða. Ein bóltur brast í høvdið á havnarmanninum, og rakti hann so meint, at Jón Rói fekk mátti gevast. Seinni varð staðfest, at hann hevði fingið heilaskjálvta.

Tískil var Jón Rói ikki millum teirra, sum vóru klárir at fara á vøllin mikukvøldið móti Ukreina.

Eftir dystin á Svangaskarði dugdi landsliðsvenjarin ikki at svara fyri, hvørt Jón Rói fór at koma seg til dystin móti Georgia ella ikki. Men á flogvøllinum sunnudagin kom svarið. Jón Rói Jacobsen kom ikki út úr bussinum saman við hinum leikarunum.

Hann er ikki komin seg heilt eftir heilaskjálvtan, hann fekk týsdagin, og soleiðis ber til at staðfesta, at tað verður ikki á hesum sinni, at Jón Rói Jacobsen verður at síggja í føroysku landsliðstroyggjuni.



*Í flogfarinum úr Føroyum spurdi eitt av ukreinsku viðhaldsfólkunum, um Jógvan Martin Olsen ikki kundi skriva sær ein autograf á turriklæð sítt*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

# Landsliðið 13 tímar í luftini

**Føroyska fótbóltslandsliðið hevur verið ígjøgnum eina langa og strævna ferð, eftir at teir í nátt lendu í Georgia. Klokkan 14.45 sunnudagin fóru teir úr Føroyum, og klokkan 03.50 lokala tíð í morgun settist flogfarið í Georgia**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*

**Tbilisi, Georgia:** Tað tók eina løtu at fáa alt viðføri hjá landsliðnum chekkað inn í Vágum, so fráferðin úr Føroyum gjørdist eitt korter seinni eitt ætlað.

Tað var trý korter til trý í gjár, sunnudagin, at føroyska fótbóltslandsliðið fór av landinum, við kós í móti Kastrup.

Klokkan seks danska tíð setti flogfarið seg í Kastrup. Steðgurin á danska flogvøllinum var góðar tveir tímar. Her fingu leikararnir ein bita, áðrenn teir klokkan tíggju minuttir yvir átta settust í eitt nýtt flogfar, sum skuldi flyta fótbóltsspælarar, venjarar, umboð frá Fótbóltssambandinum og fjølmiðlunum til eysturríkska býin Wien.

Í Eysturríki var klokkan tíggju minuttir í tíggju, tá føroyska ferðalagi trein út úr flogfarinum. Men longu góðan hálvan tíma seinni sat hópurin í einum nýggjum flogfari, sum skuldi flúgva ferðalagið úr Wien til høvuðsstaðin í Georgia, Tbilisi. Tískil rakk tíðin ikki til meira enn at renna tvørtur gjøgnum flogvøllin og leypa inn í næsta flogfarið.

Klokkan fimm minuttir í hálvgum ellivu lætti flogfarið av eysturríksku flogbreytini, fyri síðani at lenda í Tbilisi í Georgia klokkan tíggju minuttir mánamorgun lokala tíð góðar trettan tímar eftir, at ferðalagið fór úr Føroyum.

### Venja seinnapartin

Beint áðrenn flogfarið setti seg í Tbilisi, segði Jógvan Martin Olsen, venjari, við Sosialin, at nú skuldu hansara menn hvíla seg eftir longu og strævnu ferðina.

– Seinnapartin verður fara vit so at venja, men annars skulu leikararnir hvíla, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.



# Súni klárur mikudagin

**Súni royndi at sparka ein mótstøðuleikara niður, men endaði sjálvur við at gerast skaddur. Skaðin er tó ikki álvarsamari enn so, at hann verður tøkur mikudagin**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Tbilisi, Georgia:** – Eg royndi at sparka ein mann niður, men rakti so mikið gott, at eg fekk ilt og bleiv skaddur, greiðir Súni Olsen flennandi frá, tá vit spyrja hann, hvussu hann fekk skaðan leygardagin.

– Tað er skinnabeinið, sum tað gekk út yvir og tað minnir mest um eitt trælær, sum bara skal hava tíð, sigur Súni Olsen.

– Eg føli eitt lítið sindur í tí nú, men tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki mikudagin, segði Súni Olsen við Sosialin, meðan vit bíðaðu eftir viðførinum á flogvøllinum í Tbilisi.

Kendist gott at vera aftur
Gøtumaðurin var á vøllinum ein góðan tíma leygardagin. Henda løtan kendist bara góð, heldur Súni.

– Tað kendist gott. Umstøðurnar vóru nú ikki tær bestu, men tað var deiligt at spæla fótbólt aftur á høgum støði við góðari mótstøðu, sigur Súni Olsen og leggur sannførdur aftrat:

– Ja, tað kendist rætt. Tað var deiligt at spæla og eg føldi eg hevði meiri orku í mær, tá eg bleiv skaddur.